# Jólahugni í Klivanum





**Klivin í Niels Finsensgøtu í Havn hevur gjørt seg út til jóla, og jólahugni setir dám á handilshølini. Nú tað stundar til jóla, merkist hetta í Klivanum, ið selur kvinnuklæði, prýði og vistfrøðiliga kosmetikk**

Klivin er ein av handlunum í Havn, ið hevur nógv ár á baki. Klivin hevur nevniliga 21 ár á baki, og var í SMS í mong ár. Fyri 4 árum síðani fór eigaraskifti fram, og í dag heldur handilin til í Niels Finsensgøtu 18 í Havn.

Klivin selur klæðir til kvinnur, og kundarnir eru heilt frá blaðungum kvinum, til eldri dámur. Og Klivin selur umframt kvinnuklæðir, eisini prýðislutir og vistfrøðiliga kosmetikk.

## Jól í Klivanum

Eins og aðrastani, so eru tey í Klivanum í jólahýri, og hetta sæst aftur, tí jólahugni setir dám á handilin.

Og nú til jóla eru eisini tilboð, og t.d. leygardagin 29. november er opið til klokkan 18, og í hesum sambandi eru tilboð uppá cardigans og rullukragar frá Saint Tropez, har 30% eru tikin av prísinum.

Annars selur Klivin vørur í ymsum príslegum og umboðar mong merki. Nevnast kunnu Day, Munthe+Simonsen, Shoebox, Stella-nova og Mads Nørgaard, umframt fleiri onnur.

Á hillunum eru eisini prýði og vistfrøðilig kosmetikk, og prýðislutirnir, smykkurnar, eru júst nú í



nýggjum litum.

Í Klivanum eru stórir møguleikar at finna røttu jólagávurnar, og til ber at býta gávurnar um, fram til tann 3. januar í 2009.

Til ber eisini at vitja heimasíðuna HYPERLINK "http://www.klivin.fo" www.klivin.fo

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
















